

MAZDA E 2200 VØRUBILUR

Skrásetingarnr: VR 886 Km: 120.000
Árgangur: 12.10.2001

Kr. 68.000,-



MAZDA 6 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: EL 469 Km: 47.000
Árgangur: 16.09.2005

Kr. 184.000,-



YARIS 1,0 H/B 5D MMT TERRA V/K — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: TL 180 Km: 38.500
Árgangur: 09.08.2004

Kr. 112.000,-



MAZDA 626 2,0 TDI — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: SV 702 Km: 213.000
Árgangur: 10.11.1998

Kr. 64.000,-



AVENSIS 1,8 1C0 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: LD 542 Km: 176.725
Árgangur: 22.10.2003

Kr. 165.000,-



YARIS 1,3 LUNA 5D — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: JD 240 Km: 10.441
Árgangur: 04.04.2007

Kr. 158.000,-



AVENSIS 1,8 SOL AUT SED — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: PK891 Km: 67.000
Árgangur: 23.03.2004

Kr. 190.000,-



COROLLA 1,3 SEDAN — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: DT 976 Km: 126.911
Árgangur: 09.06.1999

Kr. 54.000,-



COROLLA 1,8 VERSO VAN 5D

Skrásetingarnr: HF 200 Km: 67.800
Árgangur: 06.02.2003

Kr. 104.000,-



VW VENTO GL BENSIN V/ BREKI

Skrásetingarnr: F 51.961 Km: 132.000
Árgangur: 19.07.1995

Kr. 14.000,-

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**

Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.

Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.

Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Løgnar hendingar í náttarlívinum

**Ein 15 ára gomul genta gekk í berum trussum í býnum, og ein maður í rullistóli, var so ávirkaður, at hann var ikki koyriførur. Hetta vóru bert tvær av mongu hendingunum, sum løgreglan fór út til um vikuskiftið**

VAKTHAVANDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Løgreglan hevur aftur hetta vikuskiftið havt úr at gera av ávirkaðum fólki, sum ikki dugir sær hógv. Heilar fimtan ferðir ringdi fólk til alarmsentralin um vikuskiftið um full fólk. Harumframt vóru fleiri fráboðanir til politistøðirnar.

Vakthavandi á politistøðini sigur við Sosialin, at døgnrapportirnar síðstu dagarnar er á tremur við smátingum, so sum bardøgum, herverki, húsaófriði, ferðsluóhappum og rúsdrekkakoyring. Men tíbetur onki stórmál.

- Men tað er ótrúliga løgið, at tað eru so nógv fólk, serliga blaðung, sum drekka seg frá sans og samling, so tey enda í óføri, sigur hann.

## Avdottin úti á vegnum

Men tað eru ikki bara ungdómar, sum ikki kenna leiðina heim, tá ballið er buið. So seint sum um midnáttarleitið mánanáttina funnu fólk ein mann fyrst í 40unum, sum lá avdottin hálvt úti á koyribreytini í Bøkjarabrekku í Havn. Løgreglan kom á staðið og koyrdi mannin á Landssjúkrahúsið.



*Mikudagin fór hesin niðanav beint áðrenn Skipanes*

## Ov fullur til rullistólin

Leygarmorgunin um hálvgum fimmtíðina varð ein fullur maður í rullistóli koyrdur úr einum vertshúsi í Havn. Men av tí, at ongin vildi kennast við mannin, tíansheldur hjálpa honum heim, varð løgreglan boðsend. Sløkkiliðið kom á staðið við serútgjørdum bili, og maðurin varð koyrdur á Landssjúkrahúsið.

## Nakin í býnum

Eisini gekk ein bert 15 ára gomul genta í berum trussum í býnum. Hon hevði ballast saman við vinkonunum, men hevði eftir øllum at døma fingið ov nógv niðurum. Løgreglan tók gentuna upp, og av tí at hon er so ung, vórðu foreldrini boðsend, og frágreiðing skrivað til sosialu myndugleikarnar.

## Børn vitni til húsaófrið

Tað er altíð svárt at verða boðsend til húsaófrið, har børn eru til staðar. Tvey børn, 5 og 8 ára gomul, vóru heima, tá tey vaksnu klandraðust somikið ógvusliga, at meklari frá løgregluni mátti uppí. Innbúgv varð brotið, hóttanir fuku í luftini og enn einaferð mátti staðfestast, at fyllskapur var uppií. Eisini í hesum førinum mátti løgreglan skrivað eina fráboðan til sosialu myndugleikarnar. Talan var um kenningar hjá politinum.

Í einum øðrum føri við húsaófriði legði ein ungur maður á verfaðirin.

## Trý ferðsluóhapp

Hósdagin seinnapartin var eitt ferðsluóhapp í Norðskálatunlinum. Ein maður var eftir øllum at døma sovnaður við róðrið og rendi inn í tunnilsveggin á mótsettu síðu. Tíbetur var ongin fólkaskaði, men bilurin varð vrak.

Mikudagin fór eisini ein bilur útav vegnum. Hesaferð niðanav beint áðrenn Skipanes.

Tveir bilar rendu eisini saman í krossinum við ljóskurvarnar í J. Patursonar Gøtu. Hetta var seinnapartin fríggjadagin.

## Loystu bátar frá landi

Ótangar loystu tveir smábátar frá landi í Havn fríggjakvøldið. Annar við longu bátabrúnna í Vágsbotni og hin úti við Skálatrøð. Løgreglan boðsendi manning frá Tórshavnar Havn at fáa bátarnar inn aftur. Ongin er tikin fyri brotsverkini, so løgreglan hoyrir gjarna frá vitnum til tilburðirnar.



*Seinnapartin fríggjadagin rendu tveir bilar saman við ljóskurvarnar í J. Paturssonar Gøtu í Havn*